# The Loft í Eclipse

**Í kvøld fer The Loft á pall í Eclipse. Hetta er eitt hitt heitasta navnið í Danmark í løtuni, har teirra útgáva av Midt om Natten hjá Kim Larsen hevur verið at hoyra í hvørjum horni seinnu tíðina**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Klassikarin Midt om Natten hjá Kim Larsen fekk nýtt lív, tá The Loft innspældu hann og góvu honum nýtt snið. Útgávan hevur ljóðað í Danmark seinastu 4 mánaðirnar og er The Loft millum heitastu nøvnini í Danmark í løtuni.

Í kvøld, leygarkvøld, fara teir á pallin í Eclipse í Havn. The Loft er 5 ára gamal bólkur. Hóast ungir, eru teir báðir Martin og Jakob royndir innan tónleikin. Teir vóru í New York í 2003 í kenda upptøkuhølinum The Hit factory. Teir upplivdu stóru myrkaleggingina av býnum, har ongin visti, um talan kanska var um yvirgang. Gamla hugsan teirra at sampla temaið hjá Kim Larsen til Midt om natten kom aftur. Sera stoltir eru teir av at vera teir fyrstu og einastu, ið hava fingið loyvi til at sampla frá Larsen. Og so er Midt om Natten eisini mest selda útgáva í Danmark.

Tey, ið vilja uppliva The Loft live, kunnu leita sær í Eclipse í kvøld.



## Týr trívist á toppinum í Finnlandi

**Sjónbandalagið Regin Smiður hjá føroyska rockbólkinum Týr er aðru vikuna á rað ovast á finskum hitlista**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Týr er ikki til at taka á finska hitlistanum Nordiska Videolistan. Hóast kappingin er hørð frá fleiri kendum norðurlendskum bólkum, so er ein sangur hjá Týr best umtóktur.

Tá ið Týr herfyri var í Finnlandi og spældi á tveimum konsertum, kom bólkurin í prát við eitt umboð fyri Nordiska Videolistan. Hann vildi fegin hava sjónbandalagið Regin Smið, og tað fekk hann.

Fyri tveimum vikum síðani var Regin Smiður millum eykaløgini á listanum og streyk beinleiðis inn sum nummar 1.

Hósdagin var listin dagførdur, og Týr er aftur hesaferð ovast.

## Javni vil hava minst somu játtan

**Felagið Javni heitir nú á allar løgtingslimir um at veita felagnum og øðrum feløgum, sum arbeiða fyri korunum hjá teimum brekaðu, minst somu játtan, sum feløgini fingu í fjør**

STUÐUL
*Eyðun Klakstein*

Samlaða játtanin til økið, ið eitur Stuðul til feløg hjá brekaðum er skerd úr 7.550.000 kr. niður í 7.070.000 kr., ella í alt ein skerjing við 480 túsund krónum.

– Hetta er sjálvsagt ikki stór upphædd í mun til samlaðu fíggjarætlanina, sum javnvigar við umleið trimum og eini hálvari miljard. Tað er eyðsýnt, at tað ger ongan mun á fíggjarlógini, men nívandi mun hjá feløgunum, sigur Javni í skrivinum til løgtingslimirnar.

Tí heitir Javni staðiliga á fíggjarnevndina og allar løgtingslimir, um at veita Javna og feløgum teirra brekaðu minst somu upphædd sum í verandi ári.

## Fólkatingslimir spyrja ov nógv

**Fólkatingslimir brúka Fólkatingið til at markera seg lokalpolitiskt, og tað skaðar tað meira prinsipiella kjakið, heldur umhvørvismálaráðharrin Connie Hedegaard**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Connie Hedegaard stúrir fyri gongdini í teimum sonevndu paragraf-20 spurningunum, har fólkatingslimir spyrja ráðharrar um eitthvørt.

– Ofta eru hesir spurningar so einfaldir, at tað ber til at finna svarið við at ringja til onkran, og mín meting er, at fólkatingslimirnir spyrja fyri at markera seg lokalpolitiskt, sigur Connie Hedegaard við Kristeligt Dagblad.

Í farnu tingsetu skuldu ráðharrar millum annað svara spurningum um súkkluparkering við Nørre Aaby tokstøðina, um afturlatingina av apotekinum í Brønshøj og toktíðirnar í Vipperød.

Í fólkatingsárinum 1952-1953 vóru sett 50 paragraf-20 spurningar til donsku ráðharrarnar, men í seinasta fólkatingsárið var talið 5635 spurningar. Tað verður mett, at tað kosert 3000 krónur í miðal at svara hvørjum spurningi.

# Feløgini fyri brekað skerd á fíggjarlógini

**Tað er eyðsýnt, at tað ger ongan mun á fíggjarlógini, men nívandi mun hjá feløgunum sigur Javni í skrivi til politikararnar**

FRÁ JAVNA

Javni heuvr sent soljóðandi skriv til fíggjarnevndina og allar løgtingslimirnar:

Í uppskoti til fíggjarløgtingslóg fyri 2005, sum nú er til viðgerar, er lagt upp til, at eitt hall verður á fíggjarlógini komandi ár. Sagt hevur verið, at tað er ikki ráðiligt at skerja ov harðliga, hóast stígur er í búskapinum í ár, og samfelagið tolir at hava eitt ávíst undirskot eitt ár ella bæði tvey.

Kortini er talan um sparingar á flestu økjum. M.a. sæst í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg, at feløgini, ið umboða fólk við breki, eitt nú MBF, Javni og Sinnisbati, verða skerd 10%.

Tað kann kanska í fyrstu atløgu tykast rímiligt, at eisini hesi feløg merkja sparingina. Vit í Javna hava hoyrt fyrr, at vit mugu vísa samhuga, tá sparast skal, og at vit skulu fáa peningin aftur, tá tíðirnar batna. Men at vinna nakað av tí mista inn aftur, tykist ofta tyngri. Royndirnar fáa okkum tí at spyrja: er tað rímiligt at spara á hesum øki?

### Hvar man tað muna?

Samlaða játtanin til økið, ið eitur Stuðul til feløg hjá brekaðum (8.21.5.01) er skerd úr 7.550.000 kr. niður í 7.070.000 kr., ella í alt ein skerjing við 480 túsund krónum. Av hesi játtan fær ALV størra helmingin og feløgini restina. Hetta er sjálvsagt ikki stór upphædd í mun til samlaðu fíggjarætlanina, sum javnvigar við umleið trimum og eini hálvari miljard.

Men fyri hesi feløg, sum í stóran mun dúva uppá sjálvboðið arbeiði, merkist slík afturgongd væl. Uppgávurnar eru jú stórar, og tørvurin er framhaldandi stórur, tí langt er enn á mál, til fólk við menningartarni ella øðrum breki hava fingið sømilig kor. Sparingarnar á kvøldskúlaøkinum, har serliga tey menningartarnaðu verða rakt av spariknívinum, eru bara eitt dømi um, hvørjar trupulleikar eitt nú Javni hevur at stríðast við.

Havast skal í huga, at peningur til sjálvboðið arbeiði røkkur langt, tí hvør króna setur fleiri fólk í gongd, enn tá talan er um annað lønt arbeiði. Og tá havt verður í huga, at hesar 480 túsund krónurnar, feløgini fyri brekað sambært uppskotinum skulu skerjast, eru minni enn 0,14 promillu av samlaðu útreiðslunum á fíggjarlógini, er tað, at spurningurin um hetta er rímiligt, fær nýggj perspektiv. Tað er eyðsýnt, at tað ger ongan mun á fíggjarlógini, men nívandi mun hjá feløgunum.

### Samfelagsins samvitska

Vit í Javna meta, at tað er sera óheppið og darvandi fyri arbeiðið at stimbra og stuðla fólki við menningartarni, at játtanin til felagsarbeiðið verður skerd. Tað er jú ongin loyna, at upplýsing kostar, hóast ein stórur partur av arbeiðinum verður gjørt ókeypis.

Politikarar hava mangan sagt, at feløg sum Javni eru samvitskan hjá samfelagnum - og politikarum. Tað er rætt, og tað ynskja vit í Javna at vera. Vónandi er henda sparingin ikki ein roynd at fáa samvitskuna at tagna.

Vit í Javna heita tí staðiliga á fíggjarnevndina og allar løgtingslimir, um at veita Javna og feløgum teirra brekaðu minst somu upphædd sum í verandi ári. Vit halda, at tað er hvørki rímiligt ella ráðiligt at doyva samvitskuna fyri 0,14 promillu av fíggjarløgtingslógini.

Við vón um vælvild.

SETHÚSAMARKNAÐURIN

**Eldri sethús í Nýggjagerði á Toftum til sølu**

**Húsini, sum eru í trimum hæddum eru innrættað soleiðis:**

- **loft:** kamar og óinnrættað loft
- **miðhædd:** køkur, stova, baðirúm, 2 kømur, gong, við trappum uppá loft og eitt lítið rúm.
- **kjallari:** stórt baðirúm og óinnrættaður kjallari.

Hjallur og úthús eru eisini. Húsini liggja í einum veðurgóðum umráði við avbera góðum útsýni

***Ring og hoyr nærri ella avtala tíð fyri at síggja húsini á tel. 44 17 28 ella 22 16 84 ella set teg í samband við okkum á telduposti sudurg-@post.olivant.fo***

PS-MEKLING
V/SUÐURGARÐ · 480 SKÁLA · TEL 441728 & 221684 · FAX 441748
SETHÚS · GRUNDØKIR · BYGNINGAR · LEIGUSÁTTMÁLAR

Sosialurin 341800

Sosialurin
Sosialurin
i

HÚS TIL SØLU



**Lyklaklár íbúð við Marknagilsvegin**
Talan er um eina sera snøgga íbúð, sum er gjørd úr besta tilfari. Varmi er í øllum gólvunum. Bæði uppvaski- og vaskimaskina fylgja við.
Gott útsýni og sólargangur.
Íbúðin er 67 m² + úthús. Byggiár: 2003
**Kostnaður: Kr. 1.100.000,-**



**Sethús Per Mohrsvegur 7, Hoyvík**
Húsini eru snotilig, væl útgjørd og í góðum standi.
Umhvørvið er frítt og barnavinarligt við góðum útsýni.
Støddin á húsunum er 123 m² x 2 + loft. Alt er innrættað.
Grundøkið er 525 m². Byggiár: 1982
**Kostnaður: Hóskandi boð ynskist**



**Ognin Heiðavegur 72, Saltangará**
Verður nýtt sum skrivstovubygningur og hevur netútbúnað.
Kann eisini nýtast sum sethús.
Húsini eru 79 m² + loft 66 m². Alt er innrættað.
Grundøkið: 442 m². Húsini eru høvuðsumvæld í 1991.
**Kostnaður: Hóskandi boð ynskist**



**Sethús Norðuri í Gerði 37, Fuglafjørður**
Vælhildin sethús við úthúsi í tveimum hæddum (24 m²).
Húsini eru høvuðsumvæld bæði uttan og innan.
Støddin á sethúsunum er: 43,5 m² + loft v/trimpli + kjallara.
Grundøkið er 330 m². Byggiár: 1934-35. Umvæld í 2003.
**Kostnaður: Hóskandi boð ynskist**

Áhugað verða biðin um at ringja ella støkka inn á gólvið hjá Húsamekling.
Her kunnu vit greiða nærri frá ognini, og avtala tíð at sýna húsini fram.

HÚSAMEKLING
Sp/f Protek · Vaglið · Box 331 · 110 Tórshavn
Tel 319321 · Fax 319331 · protek@post.olivant.fo · www.husamekling.fo

Sosialurin 341800

Hús, hús, hús...

W W W . S O S I A L U R I N . F O



Finn dreymahúsið í Sosialinum

SETHÚSAMARKNAÐURIN